**Fundarfrágreiðing frá Lestrarráðsfundi 21.08.18**

Møtt

Sigrid avboð vegna sjúku (Ingmar skrivar)

Firouz, Bárður, Ingmar, Karin og Árni (formaður)

- Skeiðslýsing í Masterlæru: *Religión og mannarættindi*, 10 stig
  - Sama skeiðslýsing sum á bachelor. Einasta broyting er í próvtøkuhátti: Munnlig próvtøka telur helvt og skrivlig helvt. Uppgávan skal vera millum 6.000 og 7.000 orð.
  - Orðaskifti um síðutal.
    - Eru 700 síður ov lítið?
    - Niðurstøða: Undirvísari hevur ábyrgdina av, at góðska og síðutal samsvara.
  - Skeiðsnummar verður at broyta.
  - Góðkent.
- Phd skeiðslýsing upp á 2 stig
  - Stig fyri at hava verið á ráðstevnu, tó at greiðsluevni ikki varð gjørt?
  - Lestrarráðið er samt við Árna í hansara svari til Lau. Hetta frábrigdi gongur ikki.
  - Er sent víðari til HAS, dekan á SSD.
- Vegleiðing til skeiðslýsingar
  - Tørvur er á greiðari vegleiðing at skriva skeiðslýsing
  - Verður tikið upp á næsta deildarfundi
- Løgfrøðilig fatan, BA-stig, skeiðslýsing, 10 stig
  - Alt er tað sama, tó próvtøkuháttur er broyttur. BA-stig er skrivlig roynd upp á 4 tímar. Á MA-stigi er bundin heimauppgáva afturat.
  - Onkrar broytingar verða afturat, men tað skal ikki gjøgnum lestrarráðið. Bárður boðar frá broytingum og fær hann onki svar, er tað góðtikið. Talað varð um at hava einar tveir undirvísingartímar bara fyri master. Eisini varð talað um at gera onkra broyting í setninginum og í læruúrtøkunum fyri at vísa, at BA-skeiðið er lættari.
  - Skeiðsnummar skuldi verið rætt.
- Strategi 7,5 stig
  - Er broytt frá 10 stiga skeiðnum. Próvtøka: 10 síður.
  - ”Strategi” er ov breitt. Okkurt orð átti at verið lagt aftur at, t.d. ”handilsstrategi”.
  - Góðkent.
- Strategi 10 stig
  - Hækkað í próvtøkuni: 15 síður.
  - ”Strategi” er ov breitt. Okkurt orð átti at verið lagt aftur at, t.d. ”handilsstrategi”.

    - Orðaskifti um føroyskt. Onkur hevði á lofti, at skeiðið kundi bara havt enskt heiti og sloppið sær av við tað føroyska heitið. Tí fevnir orðið ”handil” um ”business”? Onkur annar hevði á lofti, at málkós má vera kosin. Ikki alt verður gjørt eftir einum degi, men so við og við, skulu vit sleppa okkum av við føroysk heiti í búskaparfrøði,  ella skulu vit so við og við menna føroysk frøðiheiti? Ivasamt er, at tað hevði verið til at góðtaka, um vit sluppu okkum av við føroysk frøðiheiti í búskaparfrøði.
    - Læru- og undirvísingarhættir. Nú verður ”mælt til” at arbeiða í bólkum. Heldur taka tilmælið burtur og seta bólkaarbeiði í fyrsta setning saman við ”fyrilestrum, venjingum og case-uppgávum”.
    - Báðar skeiðslýsingar góðtiknar.
    - ”Aðrar greinar” verða at senda Árna til at kanna,  so at lestrarlistin ikki verður av eintáttaður.
    - Góðkent.
- N.N. góðskriving
    - Enska heitið vantar.
    - Góðskrivað 10 ECTS Búskapur og Samfelag fyri Samfundsøkonomi.
- N.N. góðskriving
    - Nógv skeið.
    - Farið er burtur frá at skeið skal koma í skeiðs stað. Tí er í lagi at biðja um at góðskriva skeið, sum Setrið onki skeið hevur fyri.
    - Donsk skeið frá 2004-2006 góðskrivað.
    - Stakskeið góðskrivað.
    - Bárður leggur aftur at hesi frágreiðing (sí niðanfyri):

---------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------

<u>N.N.:</u>

Umsóknirnar gingnar á møti. Hetta merkir:

Góðskrivað 90 ECTS tilsamans.

1) at skeiðini tikin á Fróðskaparsetrinum sum stakgreinalestur verða flutt til útbúgvingina. Tvs. hesi fýra skeið á 10 ECTS hvørt:

- Føroysk fyrisitingarlóg (2412.12)
- Føroyskur kommunurættur (2421.12)
- Føroyskur kollektivur arbeiðsrættur (2411.13)
- Sosialrættur (2447.18)

2) at hesi fimm skeiðini tikin á Keypmannahavnar universiteti verða góðskrivað útbúgvingini:

- Immaterialret (tikið 01/2004, skeiðs nr. JJUA55137U)
- Konkurrence- og markedsføringsret (tikið 01/2005, skeiðs nr. JJUA55204U)
- Kommunalret  (tikið 06/2006, skeiðs nr. JJUA 55006U)

Hesi trý omanfyri verða ikki góðskrivað í staðin fyri fyri skeið á Setrinum, men skulu góðskrivast beinleiðis.

- Forbrugerret (tikið 01/2004, skeiðs nr. JJUA04386U)
- Skilsmisseret (tikið 01/2005, skeiðs nr. JJUA04477U)

Hesi bæði omanfyri skulu góðskrivast fyri skeið á Setrinum. Forbrugerret kemur fyri Brúkaralóg (2419.15), og Skilsmisseret kemur fyri Hjúnaskilnaðarrætt (2441.16).

-----------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------

- N.N.góðskriving
  - Stakskeið tikin á Setrinum góðskrivað.
  - Bárður leggur aftur at (sí niðanfyri):

-------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------

<u>N.N.:</u>

Hon er upptikin á útbúgvingini nú í august 2018. Øll tey 75 ECTS-ini, sum hon áður hevur tikið sum stakgreinalestur,  skulu góðskrivast og flytast inn á útbúgvingina.

Talan er um hesi 10 ECTS skeið:

- Føroysk fyrisitingarlóg (2412.12)
- Føroyskur kollektivur arbeiðsrættur (2411.13)
- Sosialrættur (2447.18)
- Mannarættindi og revsirættur í Føroyum (2413.10)
- Føroyskur skattarættur (2417.10)
- Brúkaralóg (2419.15)
- Almennur starvsfólkarættur (2440.16)

Og hetta 5 ECTS skeið:

- Føroyskur kommunurættur (2421.11)

-----------------------------------------------------------------------------------------------------------------------------

- N.N. góðskriving
  - Small States in Europe: Towards a cross-disciplinary approach, 8 stig, MA-stig
  - Góðkent
- Økonometri 1, skeiðslýsing
  - Ein broyting í læruúrtøku
  - Broyting í próvtøkuhátti: skal hava staðið minst tvær innlatingar fyri at sleppa upp til próvtøku
  - Broytingar góðkendar.
  - Kanna skeiðsnummar.
  - Góðkent
- Endurpróvtøka í sannlíkindarokning og hagfrøði

- Undirvísari spyr, um próvtøkuháttur kann verða broyttur frá skrivligari til munnliga próvtøku.
- Ein heldur: Tað ber illa til at broyta próvtøkuhátt, tá tað stendur, at hann verður skrivligur.
- Fyri at broyta, áttu heimildir at broyta at verið til taks.
- Tað kundi verið skrivað í skeiðslýsingina, at heimild er fyri endurpróvtøka verður munnlig.
    - Er tað ráðiligt,  at endurpróvtøka sum regla verður munnlig? Ongin niðurstøða.